# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hálka og ferðsluupplýsing

Tað mundi koma óvart á mong, sum tíðliga í morgun settu seg í bilin at koyra til arbeiðis, í skúla ella á dagstovn við smábørnunum, at fyrstu tekinini til veturin vóru sjónlig. Serstakliga hjá teimum, ið búgva ovarlaga, merktist kuldin væl. Og tað er so ikki minst í slíkum føri, at vit eiga at vanda okkum meira og koyra eftir umstøðunum.

Men fyri summi kemur henda sníkjandi hálkan, ið oftani ikki sæst, sera óvart á. Tú hevur rætt og slætt ikki hugsað um hálku, nú tað hevur regnað nærum hvønn dag hesa seinastu tíðina, og veðrið hevur verið so lýtt. Tað gav at bíta, tá ein bilur, helst av hálku, fór rættiliga illa á landsvegnum við Hvalvík. Og hann er helst bara ein av mongum, sum er tikin á bóli seinastu nátt ella snimma á morgni.

Hetta er sum so einki nýtt. Tað endurtekur seg aftur á hvørjum ári, tá kuldi og hálka taka ræðið á vegunum. Bilførararnir eru rætt og slætt ikki andaliga "gieraðir" til hesa knappligu broyting í koyrilíkindunum.

Spurningurin er, um til ber at koma hesum til lívs ella í hvussu er at minka um óhappini, sum standast av knappliga broytta veðurlagnum. Eitt av fyrstu boðunum, sum allir bilførarar skulu halda seg til, er at koyra eftir umstøðunum. Men tá hetta er ein so stórur trupulleiki, tá hálkan sníkir seg út á vegirnar, so áttu vit at kunna roynt betri at fyribyrgt hesum óhappum. Og her kemur so upplýsing og aftur upplýsing inn í myndina. Tá vit ferðast í útlondum finnast har góðar upplýsandi tænastur umvegis útvarpið, sum siga frá og ávara um vandar í ferðluni, eitt nú tá hálka er. Hetta er eisini nakað, sum vit í Føroyum áttu at hugsað meira um. Hvussu hetta skal gerast kunnu tað helst vera nógvar meiningar um. Men tað kundi verið sum samstarv millum Ráðið fyri Ferðslutrygd, almenna útvarpið og t.d. tær fyritøkur, sum gjalda í dýrum dómum fyri mongu skaðarnar í ferðsluni, sum eitt nú koma í kjalarvørrinum á broytingum í veðurlagnum, her mest hálku.

Enn er veturin ikki komin, men hann nærkast og hví ikki til ta tíð royna eina ella aðra kunningartænastu til bilførarar longu frá tíðliga á morgni. Nú almenna útvarpið er farið at senda alt samdøgrið átti tað eisini at borið til at brúkt tað til ferðsluupplýsing. Her er víst nakað at hugsa um.

**Sosialurin**

# Kom fram í ljósið!

**SÓLVIT NOLSØE**

Seinastu tíðina hava nøkur lesarabrøv í almennu føroysku tíðindabløðunum verið frá persónum, ið vilja vera dulnevndir.

Hetta er ein gongd, ið má steðgast!

Sum lesari av báðum teimum stóru føroysku tíðindabløðunum, Dimmu og Sosialinum, kemur fyri, at mann dettur fram á okkurt áhugavert lesarabræv.

Oftast er tað yvirskriftin, ið fangar, og tí setist ein at lesa brævið.

Sum ein situr og grevur seg ígjøgnum brævið, verður mann meir og meir áhugaður í hesum, tí ofta vísir tað seg, at nógv er væl skrivað.

Eg sigi ikki her, at eg eri samdur í øllum sjónarmiðum og hugsanum, ið hesir partíðar skribentar seta fram, men alíkavæl er tað ofta stuttligt og áhugavert at lesa og síggja, hvussu ymisk vit øll eru, og hvussu nógvar og ymiskar meiningar okkara nú einaferð eru.

Komin til endan á brævinum økist spenningurin yvir, hvør hesin illi føroyingurin er. Men har verður mann ofta skuffaður! Tíverri má sigast!

Tað vísur seg, at rákið er farið tann vegin, at fólk ikki longur tora at siga, hvørji tey eru! Tey tora at spilla nógv út í almennu miðlunum, men tey tora ikki at seta sítt navn við sína hugsan. Tey vilja heldur goyma seg aftan fyri eitt dulnavn, sum eingin kennir tey við. Hví rákið er blivið so, er ikki gott at vita, men hetta er eitt mál, ið er keðiligt, og sum bløðini burdu kunnað tikið sær av.

Eftir míni meting skuldu øll dulnevnd lesarabrøv blivið kasseraði og koyrd í skrellispannina!

Eg kann taka nøkur einstøk dømir fram fyri at undirbyggja argumentini í hesum stutta skrivi:

Dimmalætting nr. 185. 26. sep 2006: Har nevnir ein seg "komandi útiseti". Hesin komandi útisetin bønar ein útiseta um IKKI at flyta heimaftur til Føroyar! Hann sigur, at hetta er eitt ræðuligt stað at búgva í! Hann leggur kristin undir at vera fundamentalistar, og hann sigur, at politikarar skoyna sær við tínari atkvøðu!

Hetta er alt rættuliga ógvuslig skriving, og eg haldi ikki, at tað er rætt, at viðkomandi skal sleppa at framseta slíkar ákærur uttan at siga, hvør hann er!

Eitt annað dømi úr sama blaði:

Ein, ið nevnir seg "Skattaborgari á Sandi" leggur hart út eftir Sands bygdaráð og serliga bygdarráðsmanninum Páll á Reynatúgvu. Vikomandi høvundur er ónøgdur við arbeiðið og arbeiðsmátan hjá Sands bygdarráði.

Hetta er so eisini í lagi, tí ein og hvør hevur rætt at vísa sína ónøgd, og ein SKAL ikki vera nøgdur við alt, men alíkavæl haldi eg, at Skattaborgarin á Sandi skal siga, hvør hann er.

Hetta lesarabræv er, sum (næstan) øll onnur lesarabrøv, hugsanir og staðfestingar, sum ein einstakur persónur stendur fyri. Tí burdi Skattaborgarin á Sandi sagt, hvør hann er, soleiðis at allar misskiljingar verða burturbeindar. "Skattaborgari á Sandi" er eitt rættuliga breitt hugtak!

So líkamikið um ein er nøgdur ella ikki, nøgdur ella stuðlar Páll á Reynatúgvu ella ikki, so haldi eg, at mann skal tora at seta navn sítt við meining sína!

Nú situr tann, ið lesur hetta kanska við eini kenslu av, at hetta lesarabræv kanska ikki hevur nakað við almenna kjakið ella dagsskránna at gera, men hóast alt haldi eg, at hetta hevur týdning. Vit liva í einum demokratiskum samfelag, har vit njóta gott av fleiri frælsum, men alíkavæl skulu hesi frælsi ikki misnýtast til at leypa á fólk uttan at tora at standa fram! Hevur tú eina meining, sum tú vil rópa hart við, kom so fram í ljósið og rópa hana! Ikki goyma teg!

Til seinast vil eg koma við eini áheitan til miðlarnar um ikki at lata dulnevnd lesarabrøv og dulnevndar meiningar koma alt ov nógv fram! Hetta er ikki gott fyri nakað, tí aloftast verður lagt á persónar og samkomur og annað í dulnevndum brøvum. Tey, ið rakt verða sleppa ikki at verja seg, tí tey vita ikki hvønn tey skulu venda sær til fyri at tala sína søk!

-------

### Viðmerking frá Sosialinum

Vit á Sosialinum eru so púra samd við Sólviti í tí hann sigur um dulnevnd lesarabrøv í føroysku bløðunum. Vilja tó vísa á, at Sosialurin tann 24. mai 1997 gjørdi av, at dulnevnd lesararbrøv ikki hava innivist í Sosialinum – og tað hava tey ikki havt síðani!

Okkara royndir hesi sløku 10 árini eru, at hetta stig hevur lyft kjakið úr tí dýki, sum dulnevnd lesarabrøv í mannaminni hava ført kjakið út í.

Vit fegnast, tá aðrir miðlar gera okkum tað eftir.

**Eirikur Lindenskov,**
**blaðstjóri**

Yvirlýsing:

## Javnaðarflokkurin fordømir ágang móti samkyndum

Starvsnevndin í Javnaðarflokkinum fordømir ta jagstran og tann ágang, sum í alt størri mun verður framdur ímóti samkyndum í okkara samfelag. Vit taka frástøðu frá valdsnýtsluni og niðrandi atburðinum, ið tykist vinda uppá seg.

Tryggjar lóggávan ikki á nøktandi hátt allar borgarar, so má hon broytast.

*Tórshavn 4. oktobur 2006*
**Starvsnevnd Javnaðarfloksins**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.